## DAGSINS MEINING

# Varaløgmaður og serfrøðin

Vit yvirtóku kongsjørðina í 1956, og nú ætlar hendan samgongan at privatisera hana. Eitt er, at tað er ábyrgdarleyst, at forera jørð føroya fólks til nakrar fáar, men hvat sigur Tjóðveldisflokkurin - ber tað yvirhøvur til?

Kongsjørðin má prinsipielt verða tað sama sum eitthvørt annað yvirtikið málsøki. Tjóðveldismenn siga, at danir hava ikki viðurkent rætt føroyinga til oljuna, hóast teir sjálvir hava samtykt kolvetnisskattalóggávu, havt eitt loyvisumfar og enntá eisini samtykt eina kolvetnisskattumsitingarlóg.

Støða Høgna Hoydals er ikki sprottin úr einum citati hjá Frank Jensen, ið annars ikki segði eitt orð um olju. Støðan hjá Høgna Hoydal viðvíkjandi hesum máli er partur av gomlu Tjóðveldisdoktrinini pussað av við onkrari studentaravhandling. Spyr Tjóðveldismenn, um vit eiga fiskin á grunnunum og jørðina vit ganga á. Teir vilja altíð svara nei, soleingi loysingin ikki er framd. Nú verður tað bert kallað, at soleingi vit ikki eru viðurkendir sum tjóð, so hava vit eingi rættindi. Man má undrast yvir, hví hesir menn yvirhøvur ómaka sær við nakrari lóggvávu undir heimstýrinum, tá tað sambært teimum sjálvum einki virði hevur.

Hettar avdúkar meira enn nakað annað stóra bluffnummarið í samband við fullveldisætlanina. Nýggja relativt óroynda leiðslan í Tjóðveldisflokkinum koyrir í sama spori, óansæð hvat umverðin og serfrøðin annars heldur, tí sannleikin liggur klárur frammanundan. Tað sigur ikki so lítið, at hóast so mætir menn, sum Árni Olafsson, Halgir Winther Poulsen og aðrir framstandandi løgfrøðingar eru á einum máli um, at einki er at ivast í viðvíkjandi oljuni, so er hetta sum at sletta vatn á gás. Tjóðveldismenn eru settir so dyggiliga uppá pláss í hesum málinum fyrr, men blása allíkavæl lív aftur í hettar málið við undirbrotligu áskoðan síni um, at vit eingi rættindi hava, soleingi "danir ikki viðurkenna okkum sum tjóð".

Tá vit gera vart við ábyrgdarleysu støðu varaløgmans í hesum máli, so er tað rættliliga prinsipielt og hevur einki við nakra heksajakt at gera, sum onkur hevur skuldsett okkum fyri. At fortelja fyri fólki, at allur ivi skal ruddast burtur, er at sáa iva. Vónandi ger løgmaður nú tað, ið gerast skal í hesum máli, nú danska pressan hevur tikið tað upp. Ger løgmaður einki, so fara Tjóðveldismenn at gera óbótaligan skaða við at reisa hettar langt síðani avgreidda mál niðri á Fólkatingi fyri at skapa rumbul - tað er sera lætt at framprovokera býtt úttalilsi frá Dansk Folkeparti, ið man so kann fylla meira og minni politiskt heft bløð við fyri at øsa fólk og sáa iva.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Olja og fólkatingsval

**Eyðun Elttør**
*landstýrismaður*



Í fimmaranum 21. november varð róð uppundir, at úrslitið av boringini hjá Faroes Partnership varð kunngjørt við fólkatingsvalinum í huga. Soleiðis er ikki.

Fólkatingsvalið varð útskrivað um sama mundið sum Faroes Partnership gjørdi av at bora eitt sindur djúpari enn upprunaliga ætlað. Møguleikin fyri, at boringin fór at enda um somu tíð sum fólkatingsvalið skuldi haldast, tvs. 20. november, var tí allatíðina til staðar.

Hósdagin 16. november gavst Sovereign Explorer at bora. Tíðindaskrivini um boriúrslit hava verið send út, tá mett verður, at úrslitið er greitt, sjálvt um seinastu uppmátingarnar ikki eru gjørdar. Oljumálastýrið hevur ongan áhuga í at bøla oman á úrslitunum.

Í hesum førinum hildu serfrøðingarnir, at neyðugu uppmátingarnar fóru ikki at verða lidnir fyrr enn í vikuskiftinum, tvs. at boriúrslitini kundu kunngerast mánadagin 19. november ella týsdagin 20. november. Sjálvandi hevði undirritaði í huga, at fólkatingsval var og at tað kundi vera óheppið at kunngera boriúrslitini so tætt at valinum.

Tvístøðan hjá undirritaða varð tó av seinnapartin fríggjadagin 17. november, tí tá skrivaði Sosialurin í leygardagsblaðnum (og seinni sama dag eisini Dimmalætting), at keldur í oljuvinnuni í Aberdeen vildu vera við, at Faroes Partnership hevði rakt við olju og gass í føroysku undirgrundini. Søgan var nú kend, og kundi eg tí ikki avsanna tíðindini, tá sjónvarpið bað um eina viðmerking til Dag og viku fríggjakvøldið 17. november.

Í samráð við løgmann gjørdi undirritaði av at halda tíðindafund mánamorgunin 19. november. Nógvar óvissur eru í sambandi við boringina hjá Faroes Partnership, og undirritaði metti, at tíðindafundurin hóast alt gevur betri møguleikar fyri at greiða frá ivamálum enn eitt stutt tíðindaskriv.

Eingin, sum fylgdi við tíðindafundinum, kann siga, at eg ella míni embætisfólk vóru ovurkát í okkara metingum. Boðskapurin var og er: úrslitið er gott, men nógv skal gerast, áðrenn endaliga fæst at vita, um lønandi framleiðsla spyrst burturúr.

Tað var óheppið, at ognarrætturin til undirgrundina varð tikin fram í valdystinum. Samanblandingin millum sjálva undirgrundina og tey ráevni, ið møguliga goyma seg í henni, hevur hvørja ferð ta avleiðing, at oljufeløg fara at ivast í heimildunum hjá føroyskum myndugleikum at veita loyvi til leiting og framleiðslu av olju og gassi. - Hetta var eisini avleiðingin hesuferð!

# Matematik

**Johan í Kollafirði®**



Úf segði, at 16 fólk vóru deyð í einum kolanámi í Kina í gjár.

Í fjør doyðu 5300 fólk í kolanámum í Kina.

Hettar gevur í meðal gott 14 fólk um dagin.

Sostatt doyðu bara tvey fólk meira enn vanligt í Kinesiskum kolanánum í gjár.

Í Kina búgva meira enn ein milliard fólk, ella yvir 24.000 ferðir fleiri fólk enn í Føroyum, og í Kina doyggja 45.000 fólk dagliga.

Tí burdi Kinesiska útvarpið (Úk) sagt frá, um so er at ein føroyingur er deyður, meira enn vanligt, tey seinastu 63 árini.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi
og svágur okkara

**Henrik Mikael Magnussen**
Søldarfjørður

doyði og varð jarðaður.

Vit takka Meinhardi Bjartalíð presti fyri góð
og vøkur orð í heiminum og í kirkjuni.

Vit takka berarum, sangarum og kirkjutænarunum. Tøkk fyri kransar, blómur, vitjanir, gávur
og uppringingar.

Tøkk fyri gávur til Bønhúsið í Søldarfirði.
Tøkk øll tit, sum vóru um okkum
og hjálptu til við ervinum.
Tøkk tit mongu, sum fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Andrea**


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

# ítróttur

Nr. 229 • týsdagur • 27. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Neistin-Kyndil 32-23 (13-12):

# Einstaklingar avgjørdu




*Kyndilsvenjarin, Jónleif Sólsker, hevur ein trupla uppgáva hjá gamla risanum, sum í løtuni mest er átøkur einum dvørgi*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Kyndil stríddust væl í grannauppgerðini móti Neistanum, men Neistin hevði einstaklingarnar, sum dugdu at avgera dystin**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Vit skrivaðu í leygardagsblaðnum, at Neistin sjáldan um nakran tíð hevði verið somikið stórur favorittur í eini grannauppgerð, sum teir vóru tað sunnudagin.

Kyndil upplivir í løtuni eitt søguliga vánaligt ár, og fáur mundi rokna við, at hetta skuldi venda í grannauppgerðini.

## Hart og spennandi

Tað var kanska eisini júst hetta, sum gjørdi, at talan leingi var um ein sera spennandi dyst sunnudagin.

Ert tú vanliga við undirlutan, so er nevnliga einki, sum kann seta so nógva ferð á, sum at standa móti sterkara grannanum, og fyri Kyndil merkti hetta, at leikararnir frá fyrsta bríksli løgdu nógv fyri. Kanska var tað ikki alla tíðina so vakurt, men tað var bit í hvørjari roynd, og hetta tóktist órógva neistamenninar, sum helst høvdu ætla sær ein hampuliga ómaksleysan sunnudag.

Soleiðis gekk leingi javnt á. Neistin hevði kanska tonnina framman fyri, men Kyndil slepti ongan tíð takinum. Hetta førdi sjálvandi til nógvar ógvusliga nærdystir, og umframt at dómararnir tvær ferðir vórðu noyddir at toga reyða kortið fram úr reyvalummanum, so kundi hetta væl verið gjørt í hvussu so er eina ferð afturat.

## Einstaklingarnir

Tað var ikki, fyrr enn seinasta korterið av dystinum, at Neistin megnaði at slíta seg leysan, og tá hetta hendi, so var tað serstakliga einum leikara at takka.

Jakob Jónsson, sum annars hevur nógv frammi sum pápi at havnarborgara nr. 18.000, dugir meira enn flestu leikarar í landinum, og nú fór hann brádliga at gera um seg.

Tá Zeljko Jotic í málinum uim sama mundi gjørdi av at læsa málið, gjørdist støðan at kalla vónleys hjá Kyndli. Teir fingu ikki meira enn fýra mál hesar minuttirnar, og soleiðis endaði ein annars javnur dystur við einum hampuliga trivaligum sigri til Neistan.

## Nýggju tíðirnar

Ósigurin prógvaði enn einaferð, at tað er stórur munur á styrkini hjá teimum báðum grannunum í løtuni, og frágreiðingin er sum so sera einføld.

Pengar eru komnir í føroyskan hondbólt, og meðan sigursvanda Kyndil á onkran hátt enn livir í søtu romansuni um, at leikarar høvdu eitt felag fyri lívið, so hevur Neistin fíggjarligu styrkina til at knýta sterkar profilar at liðnum, og tað vóru hesir, sum avgjørdu.

Kyndil eigur ikki nóg nógvar av hesum, og fyrr enn tað er komið í rættlag, fer liðið neyvan at hava ein aktivan leiklut í føroyska hondbóltsoddinum.

## Dysturin í tølum

**Neistin-Kyndil 32-23 (13-12)**
Málskjúttar:
Neistin: Heini Joensen 10(6), Jacob Jónsson 7, Áki Mørk 7, Kári Mortensen 2, John Petersen 2, Ragnar Stakksund 1, Karl Oddmar Rasmussen 1, Elmar Ósá 1, Hans Áki Dal-Christiansen 1
Kyndil: Leif Mikkelsen 7, Høgni Klein 6, Jónleif Sólsker 4(1), Janus Einar Sørensen 4, Regin Johannesen 2
Brotskøst: Neistin 8, Kyndil 2
Útvísingar: Neistin 2, Kyndil 7
Diskvalifikatiónir: Neistin 1, Kyndil 1 (báðar beinleiðis reytt)
Dómarar úr Tjaldri: Trúgvi Mortensen & Kári Hansen.

# Pól fer til NSÍ




*Pól Thorsteinsson skiftir eftir øllum at døma frá føroyameistarunum úr B36 til NSÍ*

**Sterki og fjøltáttaði leikarin fer eftir øllum at døma at royna fótbóltsevnini í Runavík komandi árið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er líkt til, at runavíkingar veruliga ætla at gera um seg í fótbóltsoddinum í ár. Eftir nøkur ár við plaseringum beint uttan fyri heiðursmerkjarøðina, verður kósin nú sett hægri, og tað tykist eisini, sum um fólkið til hetta er til staðar.

## Álop og verja

Fyrsta stigið til hetta varð tikið, tá tað varð greitt, at Helgi L. Petersen og Óli Hansen aftur koma til barndómsfelagið eftir tvey ára útlegd, og nú hevur felagið eftir øllum at døma fingið fatur í Pól Thorsteinsson.

Tá vit sunnukvøldið fingu orðið orðið á Pól, váttaði hann, at avtalan var mest sum komin í rættlag, men at partarnir enn ikki høvdu skrivað undir nakað bindandi skjal.

Hann váttaði tó, tað helst verður í Runavík, at hann fer at royna seg komandi árið.

Sostatt er líkt til, at bæði verju- og álopsparturin hjá runavíkingum er komin í rættlag, og so er spurningurin bara, hvat nýggi venjarin, Jógvan Martin Olsen, fer at fáa burtur úr tilfarinum.

Í ár var Pól annars partur av liðnum hjá greipuvinnarunum úr B36, men við hesum hevur liðið eftir øllum at døma sagt farvæl til næsta spælaranum í landsliðsflokki, nú Heðin á Lakjuni eftir øllum at døma ikki verður í Føroyum komandi árið.

Formaðurin í B36, Kristian á Neystabø, tykist tó ikki hava nakran skund í so máta.

- Sæð burtur frá Pól og Heðin, so verður hópurin mest sum hin sami komandi ár, og tað eru vit nøgdir við. Fleiri ungir leikarar eru í felagnum, sum vit rokna okkum nógv av í framtíðini, og vónandi fær onkur av hesum sítt gjøgnumbrot næsta ár.

- Sjálvandi hava vit tó eisini eygu og oyru opin um so er, at onkur møguleiki er at styrkja um liðið, men í løtuni verður tó ikki arbeitt ítøkjuligt við nøkrum leikara, sigur Kristian á Neystabø.